**Reiðarafelagi fyri Farmaskip**
**og**
**Føroya Skipara- og Navigatørfelag**

Sersáttmáli fyri skiparar og stýrimenn

**á smærri skipum í frálandavinnu (Guard-og Chasevessels)**

### §1 Sáttmálaøki

Stk. 1. Hesin sáttmáli fevnir um skip, sum eru útgjørd og góðkend til at halda vakt yvir einum og hvørjum, sum ikki hevur við fólk at gera (Guard- og Chasevessels).
Stk. 2. Ásetingarnar í høvuðssáttmálanum millum RFF og FSN eru ikki galdandi fyri hesi skip. Tó eru hesar greinar í høvuðssáttmálanum galdandi: §1, §2, § 4, §5 stk 2, §5 stk 8, §6, § 12, stk. 3, §17, §19 til og við 23.

### §2 Hýrur

Stk. 1. Skipari og stýrimenn mynstra pr. túr og verða avroknaðir pr. dag:
Við undirskrivan

| | | |
|---|---|---|
| Skipari: | 1. september 2011: | 2.054 kr um dagin |
| | 1.mars 2012: | 2.077 kr. um dagin |
| Stýrimaður: | 1. september 2011: | 1.823 kr um dagin |
| | 1.mars 2012: | 1.844 kr um dagin |

Afturat hesum kemur frítíðarløn sambært løgtingslóg um frítíð við løn nr. 30 frá 7. apríl 1986 við seinni broytingum. Reiðaríðið heldur útreiðslur av kosti umborð.
Stk. 2. Reiðaríið flytir vegna manningina frá 1. mars 2009 5% til eina av báðum pørtum góðkenda eftirlønarskipan. Henda skipan er sjálvboðin fyri menn, sum eru fyltir 55 ár, ella eru tilknýttir reiðarínum styttri enn 2 mánaðir.
Stk. 3. Skiparar og stýrimenn á skipum fevndum av hesum sersáttmála, ið eru settir í fast starv hjá reiðaríið, eru fevndir av felagsreglunum í høvuðssáttmálanum.

### §3 Arbeiðskor

Stk. 1. Útmynstringin er í mesta lagi 6 vikur umborð, og 4 dagar samanlagt til ferðing báðar vegir. Um silgt verður uttanfyri Norðurevropa er útmynstringin tó í mesta lagi 8 vikur umborð, og 4 dagar samanlagt til ferðing báðar vegir.
Stk. 2. Um fari verður út um ávikavist 6 og 8 vikur umborð verður goldin ein upphædd svarandi til 25% av daglønini fyri hvønn dagin. Um fari verður 14 dagar út um ávíkavist 6 og 8 vikur, verður goldin ein upphædd svarandi til 50% av daglønini fyri hvønn dagin. Hetta er tó ikki galdandi um skiparin ella stýrimaðurin ynskja at vera longur umborð.

### §4 Mynstring og uppsøgn

Stk 1. Hýringin er galdandi fyri ein túr í senn, frá maður fer heimanífrá til hann er heima aftur.
Stk 2. Um reiðaríið ynskir at fáa mann við aftur, skal hann boða honum frá hesum innan 7 dagar eftir at túrur er av.
Stk 3. Hevur maður lova seg við skipi, og vil hann geva avboð, so skal hetta gerast í seinasta lagi 3 dagar áðrenn farið verður. Halda partarnir ikki skyldu sína smb. hesi grein til at geva avboð

rættstundis, so skal reiðari, sum er ov seinur at geva avboð, rinda eina samsýning, sum svarar til 50% av dagløni í:
3 mánaðir fyri skipara
2 mánaðir fyri 1. stýrimann
1½ mánað fyri 2. stýrimann.
Stk. 4. Maður sum gevur avboð ov seint skal rinda reiðarínum í samsýning upphædd, ið svarar til 15 ferðir daglønina, hetta er tó treytað av, at maður minst 10 dagar áðrenn farið verður, fær boð um nær farið verður.

**§5 Bjarging**

Um reiðaríið við sáttmála hevur frásagt sær rætt til bjargingarløn, hava skipari og stýrimenn ikki rætt til bjargingarløn.

**§6 Gildi**

Stk. 1. Hesin sáttmálin kemur í gildi tann 1. sept. 2011, og kann sigast upp frá báðum pørtum við 3 mánaða varningi, fyrstu ferð til 1. mars 2013.

**29. juni 2011**

**Føroya Skipara- og Navigatørfelag**
**Reiðarafelagið fyri Farmaskip**